# TB mannað nevndir

Á eykaaðalfundi hjá Tvøroyrar Bóltfelag sunnudagin vórðu allar nevndirnar mannaðar. Nógv hevur verið tosað um, um tað fór at eydnaðst at manna nevndirnar í Tvøroyrar Bóltfelag, eftir at allir nevndarlimirnir løgdu frá sær á aðalfundinum. Á eykaaðalfundinum í dag vórðu nevndirnar valdar, og manna hesi nevndirnar: Í starvsnevndini eru Jóhan Petur Olgarsson, Jean Dimon og Mina Joensen. Í fótbóltsdeildini eru Oddur Dimon, Sigvald Steinkross, Tummas Niclasen og Nina Holm. Í ungdómsdeildini eru Marit Pólsdóttir, Daisy Hammerfoss og Ingrid Silvurdal. Nevndirnar fara at skipa seg í næstu viku, upplýsir Jóan Petur Olgarsson, sum tók við afturvali, fyri Suðuroyarportalinum.



*Kelda: www.sudurras.fo*

# FA sáttmála við Súluna

Nýstovnaða fakfelagið Súlan, sum er fyri kabinustarvsfólkini hjá Atlantic Airways, heitti fyrr í ár á Føroya Arbeiðsgevarafelag um at taka upp sáttmálasamráðingar um øki, sum ikki fyrr hevur verið í sáttmála undir Føroya Arbeiðsgevarafelag. Hesar samráðingar eru nú loknar, og 11. november 2008 undirskrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Súlan sáttmálan. Sáttmálin er galdandi frá 1. november 2008 til 1. november 2010, og lønarhækkingarnar í hesum sáttmálanum, í mun til lønirnar í gamla innanhýsis sáttmálanum, eru á sama støði, sum teir sáttmálar Føroya Arbeiðsgevarafelag annars hevur gjørt í hesi samráðingarrunduni.

*Kelda: www.industry.fo*

# ldsdsfastur politikkur um alt landið

hetta støðuga uppáhaldið, at felagsskapurin er eitt haft um beinini á tí einstaka, at sjálvdráttur er betri enn felags stev, at privatiseringar altíð eru av tí góða, og at liberalisman skapar varandi virðir og vøkstur, riggaði ikki.

- Bløðran brast. Tað er nú prógvað og sligið fast við sjeytumma seymi. Tí eru nú boð eftir hugsjónum, ið kunnu leggja lunnar undir eitt veruligt sjálvberandi vælferðarsamfelag í vøkstri, sigur flokkurin.

- Altjóða marknaðarbúskapurin skal ganga lið um lið við tí samhaldsfasta samfelagnum - ikki yvirtaka samfelagið. Henda kósin er okkara - hetta er tann sosialdemokratiski arvurin.

Landsfundurin fegnast eisini um, at Javnaðarflokkurin framhaldandi er í samgongu, og at tað í samgonguskjalinum millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Fólkaflokkin eru hópin av góðum og grundleggjandi javnaðarmálum, sum tikið verður til.

- Endamálið í samgonguskjalinum er at føra ein sterkan, samhaldsfastan politikk í øllum landinum, við denti á altjóðagerð eins og lívfrøðiligari burðardyggari fiskivinnu. Hetta er ein broyting í mun til undanfarna ABC-skjal.

## Alment virksemi tryggjast

Landsfundurin er eisini samdur um, at hóast málið er at fáa avlop á fíggjarlógini sum skjótast, er neyðugt, at tað almenna tryggjar virksemið kring landið og tryggjar, at grundleggjandi kjarnutænasturnar eru óskalaðar, sjálvt um hetta merkir hall einstøk ár.

- ALS útgjaldið skal hækka og tryggja virðilig kor fyri tey, ið nú verða rakt av tilfeingis- og fíggjarkreppu.

Samstundis skal umskúling og førleikamenning vera tøk fyri øll, ið gerast arbeiðsleys.

Flokkurin er eisini samdur um, at størri partur av inngjaldinum til Samhaldsfasta verður útgoldin teimum, sum eru pensjónistar í dag, samstundis sum grunnurin framhaldandi skal styrkjast fíggjarliga.

- Tað er rætt at fara undir ein samhaldsfastan kommunalreform, soleiðis at øll øki í landinum hava javnbjóðis møguleikar. Flokkurin heldur tað vera neyðugt at viðgera spurningin, hvussu vit kunnu hjálpa mest skuldarbundnu kommununum sambært neyvt ásettum reglum.

Landsfundurin fegnast eisini um samhaldsfasta tiltakið, at veita Íslandi eitt gjaldførislán.

Flokkurin heldur eisini, at vit mugu gera neyðugar broytingar í verandi fiskivinnuskipan, so hon verður lívfrøðiliga, umhvørvisliga og fíggjarliga burðardygg.

Tað er framleiðslukipanin, sum tryggjar bestu góðsku og fyrireikingar skulu gerast til at skipa keyp og sølu av fiskirættindum á fiskidagamarknaði.

Harafturat heldur Javnaðarflokkurin, at tað er neyðugt at endurskoða allar sosialar skipanir, soleiðis at tær altíð gagna teimum, ið veruliga hava tørv á samhaldsføstum veitingum.

- Játtanir til heimarøkt og aðrar heilsutænastur eiga í størri mun at koma brúkarunum til góða og øll útbúgvingarskipanin eigur at verða styrkt munandi og lagað til teirra, sum hava serligan tørv. Granskingin eigur at verða styrkt – eisini vinnugranskingin, mentanarlívið eigur at verða ment og virðismett sum eitt aktiv í framburði landsins, sigur javnaðarflokkurin.



*Allar sosialar skipanir skulu endurskoðast, soleiðis at tær altíð gagna teimum, ið veruliga hava tørv á samhaldsføstum veitingum, hevur Javnaðarflokkurin samtykt á landsfundi í Klaksvík um vikuskiftið*

# nur sanerast afturfyri at leggja saman



*- Kommunur, sum eiga nakrar krónur í kistubotninum renna undan samanlegging við tær fátæku kommunurnar og tí er einasta loysn kanska at sanera skuld hjá teimum ringast staddu kommununum, var ein boðskapur til javnaðarfólk á landsfundi í Klaksvík umj vikuskiftið*

Onkur hevur nevnt, at vandi er fyri, at vit fara fáa A og B kommunur.

- Men tað er greitt, at tá ið ein kommuna brúkar allar sínar inntøkur til at gjalda rentur og avdráttir, fáa borgararnir ikki tær tænastur, sum borgarar fáa í øðrum kommunum, segði Jóannes Eidesgaard.

Umframt at vera formaður javnaðarfloksins, er Jóannes Eidesgaard eisini landsstýrismaður í fíggjarmálum og hann segði, at hann hevur mangan hugsað, at einasta gongda leiðin burtur úr vónleysu støðuni hjá ávísum kommunum er, at tær verða saneraðar.

Hann legði tó dent á, at hann hevði ikki viðgjørt hetta saman við hinum flokkunum í samgonguni.

- Leggur tú tvær fátækar kommunur saman, fært tú eina stóra fátæka kommunu.

- Og tær kommunur, sum eiga nakrar krónur á kistubotninum, hava hug at renna undan samanlegging við tær fátæku.

## Sanering ein gongd leið

Tí heldur Jóannes Eidesgaard, at ein sanering niður á leið eina álíkning treytað av einari samanlegging, kundi verið ein gongd leið.

Men tað eigur eisini at vera fortreyt er, at vit tá hava eina eitt neyvt eftirlit við fíggjarviðurskiftunum hjá kommunum fyri at forða fyri at tær ikki aftur økja skuldina og seta seg í somu støðu.

- Tað er ein royndur lutur, at fíggjarstýringin hjá summum kommunum hevur ikki verð nóg neyv og nógvar kommunur hava slett ikki tamarhald á fíggjarstýringini.

Í hesum sambandi fortaldi hann, at fíggjarmálaráðið roynir nú í samstarvi við kommunurnar at fáa meira gjøgnumskygni í fíggjarligu viðurskiftini hjá kommunum.

- Vit skulu minnast til, at kommunubúskapurin er um helvtina av samlaða búskapinum, segði Jóannes Eidesgaard, so skal toppurin sanerast av skuldini hjá teimum mest skuldarbundu kommununum, má tað vera ein fortreyt, at landið fær eftirlit við fíggjarstýringini hjá kommununum.

## Sjey kommunur

Í hesum sambandi upplýsti hann, at landsstýrið nú hevur sett eina kommisjón, sum skal koma við einari tilráðing til politisku skipanina um, hvussu vit koma niður á sjey kommunur í Føroyum í hesum valskeiðnum.

Eitt, sum kommisjónin skal taka støðu til, er, hvørji øki kommunurnar skulu fáa at umsita, og hvussu ein blokkstuðul í hesum sambandi skal leggjast til rættis.

- Eisini skal ein útjavningarskipan gerast, har kommunur, sum ikki fáa inntøkur frá almenna virkseminum, eisini fáa sín part, segði Jóannes Eidesgaard.

Hann staðfesti, at hesin kommunureformurin verður eitt av flaggskipunum hjá hesi samgonguni